# Vænta skipini heim í oktober

**Olaf Olsen, reiðari hjá Beta, var í Vigo í Spaniu herfyri. Afturkomin staðfestir hann, at byggingin av nýggju trolarunum gongur sum ætlað – Vit vænta at fáa tvey góð skip í oktober, sigur reiðarin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Enn hevur P/F Beta ikki endaliga avgjørt, hvørji skip fara úr flotanum fyri trolararnar, sum felagið byggir í Spaniu. Heldur ikki er alment kent, hvørjir skipararnir verða. Í báðum førum eru nøvn nevnd, men enn vil reiðarin, Olaf Olsen, ikki vátta nakað í hesum sambandi*

Sambært byggisáttmálanum skulu nýggju trolararnir, sum P/F Beta í Saltangará letur byggja í Vigo í Spaniu, verða lidnir, 27. september í ár.

Olaf Olsen, reiðari, hevur nýliga verið í Spaniu og skoðað verkið. Hann væntar, at byggitíðin fer at halda, og at trolararnir verða í Føroyum í oktober.

– Hetta er nú blivið til tvey skip, sum standa á skipasmiðjuni í Vigo, og eg haldi, at skipini síggja gott út, sigur Olaf, sum var í Spaniu fyri góðari viku síðan.

Beta letur tveir nýggjar trolarar bygga í Vigo, sum koma inn í fiskiskipaflotan fyri tríggjar av gomlu Cuba-trolarunum. Enn er tó ikki avgjørt, hvørji skip fara úr flotanum, og heldur ikki er alment kent, hvør skal føra nýggju trolararnar. Nøvn eru nevnd, men Olaf vil ikki vátta nakað enn.

### Størri veiðiorku

Nýggju trolararnir eru 37-38 metrar langir og 9,5 metrar breiðir. Cuba-trolararnir eru tað sama til longdar, men 1,20 metur smalri. Gomlu skipini hava eina maskinu, sum er 1200 hk., meðan maskinan á nýggju skipunum er 1305 hk.

– Nýggju skipini hava størri veiðiorku enn tey gomlu; tí fara trý skip úr flotanum fyri tey bæði nýggju.

Olaf vísir á, at veiðiorkutalið er samansett av brottu tonsum og hestamegi, og í hesum førinum merkir tað, at trý skip mugu út fyri tey bæði, sum koma inn í flotan.

Maskinverkstaðurin, FJM í Runavík, skal gera arbeiðsdekkini á nýggju trolarunum, eitt nú pavnar, bond og annað. Hetta arbeiði verður gjørt í Føroyum, og síðan fara menn hjá FMJ niður til Vigo at seta arbeiðsdekkið upp.

### Gott tekin

Olaf Olsen sigur annars, at fiskiskapurin hjá teimum átta Cuba-trolarunum hevur verið hampiliga góður í vár, tó ikki heilt so góður sum í fjør vár.

– Tað hevur viðrað nógv verri í vetur enn í fjør vetur. Vit hava ikki havt nakað serligt harðveður, men tað hevur verið keðiligt fiskiveður ein stóran part av vetrinum og várinum, sigur reiðarin.

Spurdur, hvat hann heldur um, at upsin, sum skipini fáa, er so smáur, sigur Olaf Olsen:

– Tað er rætt, at upsin er heldur smáur, men hann var eisini smáur í fjør vár. At nógvur ungur fiskur er til, taki eg ikki sum nakað ringt tekin, sigur reiðarin at enda.

# Fekk skaða í høvdið umborð á svartkjaftaskipi

**Ein tíma eftir, at Sjóbjargingarstøðin, MRCC-Tórshavn, fekk fráboðanina um skaðan, var tyrlan hjá Atlantsflogi á leiðini og flutti mannin beinleiðis á Landssjúkrahúsið**

ARBEIÐSSKAÐI
*Vilmund Jacobsen*




*Ein tíma eftir, at MRCC-Tórshavn fekk fráboðanina um arbeiðsskaðan umborð á norska svartkjaftaskipinum, Hargun, var tyrlan hjá Atlantsflogi á leiðini og kundi flyta mannin á Landssjúkrahúsið. Í gjár livdi maðurin væl eftir umstøðunum.*

Ein blaðungur maður fekk í vikuni álvarsligan skaða í høvdið umborð á norska svartkjaftaskipinum, Hargun. Maðurin bløddi illa, og tørvur var á at flyta hann á sjúkrahús beinanvegin.

– Vit fingu fráboðanina mikumorgunin, 17. apríl kl. 11.00, sigur Sjóbjargingarstøðin, MRCC-Tórshavn í tíðindaskrivi.

Hargun, ið er av sama skipaslag, sum Christian í Grótinum, var staddur einar 107 fjórðingar í ein útsynning úr Akrabergi, tá ið óhappið hendi.

– Skiparin á Hargun varð ígjøgnum Tórshavn Radio settur í samband við Landssjúkrahúsið til tess at greiða lækna frá støðuni, sigur Sjóbjargingarstøðin, sum hevur til uppgávu at samskipa leiting og bjarging í føroyskum sjóøki.

MRCC-Tórshavn bað tyrluskiparan hjá Atlantsflogi gera BELL 412 tyrluna út til at fara eftir manninum. Síðan kunnaði Sjóbjargingarstøðin Tjaldrið, løgregluna, Færøernes Kommando, Landssjúkrahúsið og flogvøllin um støðuna og kannaði eftir, hvørja útgerð tyrlan skuldi hava við sær út til svartkjaftatrolaran.

– Síðan sendu vit tyrluna avstað, sigur MRCC.

Og skjótt gekk, má sigast, tí longu um middagsleitið var tyrlan hjá Hargun.

– Í samskifti við vakthavandi lækna á LS varð avrátt av flúgva mannin beinleiðis á Landssjúkrahúsið, har hann nú er innlagdur og livir eftir umstøðunum væl, sigur Sjóbjargingarstøðin.

### Arbeiðsskaði

Sosialurin royndi at fregnast hjá MRCC, hvat veruliga hendi unga fiskimanninum umborð á Hargun, men tað høvdu teir ikki fingið at vita.

– Okkara uppgáva var at fáa mannin undir læknahond sum skjótast, og tað eydnaðist tíbetur bæði skjótt og væl, sigur MRCC.

Sum skilst, varð norski fiskimaðurin raktur av einum arbeiðsskaða, sum endaði í øllum góðum.



Tilfar gongur undan í Fólkaskúlanum:

# Næmingar sita hendur í favn

**Lærarafelagið noktar limum sínum at røkja serstovur og amboð í fólkaskúlanum. Hetta hevur við sær, at einki tilfar verður keypt inn til hesar lærugreinarnar. Úrslitið er, at næmingarnir ikki fáa nøktandi undirvísing í teimum handaligu lærugreinunum og mugu bara sita hendur í favn**

FÓLKASKÚLIN
*Stefan í Skorini*



*Tilfar er við at ganga undan í teimum handaligu lærugreinunum í fólkaskúlanum. Smíðstovan í Kommunuskúlanum stendur so symbolskt tóm. Næmingarnir fáa ikki nóg mikið av tilfari at arbeiða við*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Handaligu lærugreinarnar í føroyska fólkaskúlanum liggja í dvala. Orsøkin er, at einki nýtt tilfar verður keypt inn. Endin er sjálvandi, at einki tilfar er eftir tá avtornar.

– Tað, sum hendir nú, er, at tilfarið gongur undan í teimum handaligu lærugreinunum, har vit skulu keypa nógv inn, sigur Jógvan Martin Mørk, varaskúlastjóri í Eysturskúlanum. Hann ásannar, at undirvísingin ikki fer fram, sum hon eigur, og hesum kann skúlin ikki liva við.

Hetta rakar serliga tær handaligu breytirnar, sum næmingar í 10. flokki hava tveir dagar um vikuna. Einki tilfar er eftir, og tí fáa næmingarnir onga veruliga undirvísing í hesum lærugreinunum.

Vit frætta frá fleiri næmingum, ið ganga á teimum serligu handaligu breytunum í Havn, t.d. handarbeiðs- og listabreytunum, at næmingarnir í fleiri førum bert sita og trilla tumlar ella sita hendur í favn, tí einki tilfar er at arbeiða við.

Tað rakar tó ikki bert breytirnar, men allar handaligar lærugreinar í øllum fólkaskúlum kring landið.

Niels Nattestad, skúlastjóri í Venjingarskúlanum í Havn, ásannar, at tilfarið minkar so hvørt. Hann fílist tó á framferðarháttin hjá Lærarafelagnum í hesum málinum. Hann ivast í, um hetta er rætti mátin at handfara málið.

– At leggja arbeiðið niður rakar bæði lærarar og næmingar hart, tí lærararnir skulu framvegis undirvísa, hóast einki tilfar er til taks, og tað er sera strævið fyri báðar partar, sigur Niels Nattestad.

Hann leggur tó afturat, at hann tekur undir við kravinum hjá Lærarafelagnum um at fáa skipað viðurskifti á hesum økinum.

### Skúlastýrini vísa á trupulleikan

Skúlastýrini í Tórshavnar Kommunu hava gjørt vart við trupulleikan. Fyri einum góðum mánað síðan sendu umboð fyri øll stýrini í kommununi landsstýrismanninum við skúlamálum, Óla Holm, eitt skriv.

– Støðan í skúlanum er nú, at børn okkara ikki kunnu fáa ta undirvísing, tey hava rætt til og krav uppá, stendur í skrivinum, sum er dagfest 18. mars. Víðari stendur, at skúlastýrini vilja gera vart við, at undirvísingin í fleiri lærugreinum ikki er nøktandi.

Nú er ein mánaður liðin, síðan skrivið kom landsstýrismanninum í hendi, og støðan er versnað síðan tá.

Skúlastýrini taka ikki støðu fyri ella ímóti nøkrum av pørtunum í málinum, men tey átala harðliga, at málið viðvíkjandi røkt av serhølum og amboðum ikki er loyst enn. Tey heita á myndugleikarnar um at finna eina loysn á trætuni.

### Gamal trupulleiki

Elsa Birgitta Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, sigur, at felagið noktar limum sínum at røkja serstovur og amboð, fyrr ein skipan er sett í verk fyri savnsrøktirnar. Orsøkin er, at hetta málið hevur ligið á láni í fleiri ár.

– Málið um savnsrøktirnar stavar frá 1977, tá landsstýrið og Lærarafelagið á fyrsta sinni avtalaðu at fáa eina skipan setta í verk. Vit hava eisini gjørt avtalur bæði í 1999 og 2000 um at fáa viðurskiftini í rættlag, men einki er hent. Ikki fyrr enn vit blokera uppgávurnar til próvtøkurnar í summar, tástani vakna myndugleikarnir, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Samráðingarnar millum Lærarafelagið øðrumegin og Mentamálastýrið, Fíggjarmálastýrið og Kommunusamskipan Føroya hinumegin fóru í gongd mikudagin, tá partarnir avtalaðu, hvussu samráðingarnar skulu fara fram.

Eingin ivi er um, at hetta er ein stórur trupulleiki, sum má loysast beinanvegin. Næmingar og foreldur vísa á, at støðan er ótolandi, og skúlastjórar gremja seg um vantandi tilfar.

# Skúlastjórin hevur ábyrgdina

**Olaus Jespersen, deildarstjóri á Fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum, sigur seg ikki skilja, hví einki tilfar verður keypt inn. Hann vísir á, at hesum hevur skúlastjórin ábyrgdina av hesum, og hann kann tí keypa inn**

FÓLKASKÚLIN
*Stefan í Skorini*



*Olaus Jespersen, deildarstjóri á Fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum, heldur ikki, at tað skuldi verið nakar trupulleiki, at lærarar ikki vilja røkja serstovur og amboð*

– Sum eg havi skilt málið, so hava lærararnir boðað frá, at teir nokta at gera arbeiði, sum teir ikki eiga at gera. Eg skilji ikki, at hetta hevur við sær, at einki tilfar verður keypt inn.

Hann vísir á fólkaskúlalógina, sum greitt sigur, at skúlastjórin hevur fyrisitingarliga og námsfrøðiliga leiðsluna í skúlanum. Stjórin kann tí syrgja fyri, at tilfar verður keypt inn til tær ymsu lærugreinarnar.

– Tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki, at lærarar hava lagt hetta arbeiðið niður, tí leiðslan hevur ábyrgdina av innkeypum og ikki lærararnir.

Tað eru sostatt skúlastjórarnir, ið leggja arbeiðið niður, um teir ikki keypa inn.

### Fáa ikki gjørt alt

Hanus Joensen, skúlastjóri í Tórshavnar kommunuskúla og formaður í skúlaleiðarafelagnum, ásannar, at stjórin hevur alla ábyrgdina av virksemi skúlans.

Hann vísir tó á, at ein skúlastjóri ikki kann vera við í øllum virksemi. Ein skúlastjóri býtir uppgávurnar út til lærararnar, sum síðani fremja tær í verki.

– Vit kunnu ikki fara at keypa inn til allar lærugreinarnar, har einki tilfar er eftir. Vit hava ikki nóg gott innlit til tess, tí tað eru lærararnir, sum vita nágreiniliga, hvat skal keypast. Vit kunnu tí einki gera í hesum málinum, sigur Hanus Joensen.

Samráðingarnar millum partarnar um savnsrøktina eru farnar í gongd. Men so leingi eingin sáttmáli er undirskrivaður, verður einki tilfar keypt inn til undirvísingina, og serliga handaligu lærugreinarnar eru hart raktar.

Olaus Jespersen leggur afturat, at hann væntar, at partarnir kunnu samráða seg fram til eina semju, og at ein loysn verður funnin. Hann sigur, at partarnir hava víst góðan samráðingaranda, og tí hevur hann góðar vónir.